# Sjónleikarar fingu góð skoðsmál í Týsklandi

**22 børn úr Føroyum hava júst verið í Týsklandi á eini altjóða sjónleikarstevnu, har tey framførdu ein sjónleik um kópakonuna. Leikurin fekk sera góð skoðsmál í týskum bløðum, og fólk vóru hugtikin av Føroyum og børnunum**

SJÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*

Síðan seinasta heyst hava 22 børn í aldrinum 12-15 ár vant leikin um kópakonuna. Í seinastu viku sluppu tey veruliga at royna seg við leikinum. Leikbólkurin hjá Hjørdis Johansen í Havn var tá við í eini sjónleikarstevnu í týska býnum Lingen í Norðurtýsklandi nærhendis hollendska markinum. Stevnan nevnist World Festival of Children´s Theatre, og hon var frá 14. til 22. juni.

Talan er um eina sera stóra og viðurkenda stevnu. Við á henni vóru 22 leikbólkar úr 22 ymiskum londum, og hetta vóru fyri tað mesta elitubørn, sum hava vant sjónleik, sang og dans frá tí tey vóru heilt lítil.



*Børnini fingu framúr góð ummæli í týskum bløðum, eftir at tey høvdu framført leikin um kópakonuna á eini altjóða sjónleikarstevnu í týska býnum Lingen*



*Børnini fingu rós fyri at hava tað neyðuga hegni at sýna sterkar kenslur á palli. Hetta hjálpti áskoðarunum at skilja søgugongdina og tær ymsu hendingarnar uttan at skilja málið, sum nýtt varð á palli*

### Góð ummæli

Leikritið er bygt á væl-kendu søgnina um kópakonuna, og leikararnir og leikstjórin fingu sera góð ummæli í týska blaðnum Lingener Tagepost, sum skrivaði um leikin. Leikritið er tó nýtt, og leikurin tekur umleið 50 minuttir at spæla.

– Tað hevur eydnast tí norðurlendska leikbólkinum at lýsa ta heldur torskildu søgugongdina, so at áskoðararnir kunnu skilja allar senurnar og søgugongdina uttan at skilja málið, sum verður nýtt á pallinum, skrivar blaðið Lingener Tagepost.

Hjørdis Johansen var eisini sjálv ovfarin av, hvussu væl børnini greiddu leikin úr hondum. Hon greiðir frá, at tá leikstjórarnir høvdu ein fund eftir stevnuna, var føroyski leikurin fleiri ferðir havdur á munni sum ein tann besti.

– Uttan at taka munnin ov fulla vænti eg, at vit høvdu verið millum fimm ella seks tey bestu á stevnuni, sigur Hjørdis.

Lingener Tagepost leggur afturat, at børnini koma væl frá avrikinum á pallinum. Blaðið skrivar, at leikararnir duga sera væl at vísa sterkar kenslur, og at hetta ger tað lættari hjá áskoðarunum at skilja gongdina.

– Í hesum leikinum hava børnini megnað at fortelja eina gamla søgn, so at hon gerst viðkomandi fyri okkum í dag, skrivar Lingener Tagepost, sum annars bara hevur rósandi orð um føroyska leikin.

### Dramaverkstaðið

Tey 22 børnini, sum vóru við á ferðini, hava øll gingið á dramaverkstaðnum, sum Hjørdis hevur staðið fyri seinastu fimm árini.

Leikstjórin Hjørdis Johansen greiðir frá, at tá børnini spældu leikin fyri einum ári síðani, gjørdi hon av arbeiða víðari við honum. Nøkur av børnunum hava tí vant leikin í tvey ár. Tey hava tó vant við hesi útgávuni av leikinum síðan fjørheyst.

Tónlein til leikin hevur Jóan Petur Andreasen skrivað, meðan Finnur Hansen og Christian Kruse hava gjørt ljóðeffektirnar. Turpin N. Djurhuus var ljósmaður á ferðini, og Christian Kruse var ljóðmaður. Rannvá Justinussen, sum hevur gingið á dansiskúla í Onglandi, hevur skipað fyri dansinum í leikinum. Hetta er tí føroysk framleiðsla úr einum enda í annan.

– Eg fann hesa stevnuna á internetinum og sendi eina umsókn. Síðani fekk eg at vita, at hetta ikki var ein stevna, har ein og hvør kann boða frá luttøku, men tað var fyri serliga innbodnar leikbólkar, greiðir Hjørdis Johansen frá. Hon fekk síðani játtandi svar frá fyrireikarunum, og tað var hon sera bilsin av.

### Altjóða luttøka

Hjørdis Johansen greiðir frá, at 22 leikbólkar frá 22 ymiskum londum vóru við á stevnuni. Talan var um rættiliga framkomnar leikbólkar við børnum. Hon nevnir m.a. Peking-operuna og Kiev-ballettina, sum høvdu sera professionellar framførslur. Hetta er talan um elitubørn á hægsta stigi.

Eitt krav fyri at vera við á stevnuni var, at allir leikbólkarnir skuldu hava ein bás, sum lýsti nøkur viðurskifti frá heimlandinum. Hesin básurin var sera væl vitjaður, og fólk sýndu stóran áhuga fyri Føroyum. Tey høvdu bara vørur at sýna fram og ikki at selja, men Hjørdis metir, at um tey høvdu nóg mikið av vørum kundu tey selt eina rúgvu.

Eisini høvdu børnini lært seg at kvøðu kvæðið um kópakonuna, og tey dansaðu fleiri ferðir fyri fólki, sum sýndu stóran áhuga.

Hjørdis fýlist annars á, at føroysku fjølmiðlarnir altíð eru sera raskir at fylgja við øllum ítróttarliðum, ið ferðast uttanlands, meðan tað mentanarliga virksemið, ið føroyingar fáast við uttanlands, ikki fær ta umrøðu, sum tað hevur uppiborið. Fleiri sjónvarpslið vóru við á stevnuni og aðrir fjølmiðlar gjørdu nógv burturúr.

Føroyingar fáa eisini møguleikan at síggja leikin um kópakonuna. Hann verður sýndur 13. august í mentanarhúsinum í Fuglafirði. Hetta er seinasti dagur á Listastevnuni. Hjørdis er tó eitt sindur vónbrotin av, at tey ikki sleppa at spæla leikin í Norðurlandahúsinum, men tað verður ikki á hesum sinni.

## Børnini sum vóru við

| | | |
|---|---|---|
| Turið | Nattestad | Tórshavn |
| Dís | Í Dali Jespersen | Tórshavn |
| Heidi | Olsen | Tórshavn |
| Ata Kamilla | Ravnsfjall | Hoyvík |
| Birita | Djurhuus | Tórshavn |
| Brynja | Erlendsd. Simonsen | Hvítanes |
| Christina | Jensen | Tórshavn |
| Sigga | Andreasen | Hoyvík |
| Eivind | Dahl | Tórshavn |
| Julia | Jacobsen | Tórshavn |
| Jákup | Højgaard Lützen | Tórshavn |
| Unn | Hansdóttir | Kvívík |
| Rannvá | Nónfjall | Tórshavn |
| Natalia | Isaksen | Tórshavn |
| Katrin | Mortensen | Tórshavn |
| Rósa | Egholm | Tórshavn |
| Birita | Í Dali | Tórshavn |
| Edith | Jacobsen | Tórshavn |
| Ann Krista | Í Dali | Tórshavn |
| Vølundur | Lognberg | Argir |
| Peter Meinard | Ellebye Andersen | Tórshavn |
| Rógvi | Dam | Argir |



*Leikurin varar í 50 minuttir, og leikararnir dansa nógv á pallinum. Her verður dansað av øllum alvi, og Rannvá Justinussen hevur skipað fyri dansinum*





*Bjarni Askam, stjóri á Kalli, væntar at kappingarneytin Føroya Tele fer at svara skjótt aftur, nú Kall fer at bjóða út fartelefontænastur*

# Kall fer eftir fartelefonunum

**Í november í ár ætlar fjarskiftisfyritøkan Kall at bjóða seg fram á marknaðinum fyri fartelefoni. Fyritøkan hevur gjørt avtalu við svenska fjarsiftisrisan Ericsson um teknisku útgerðina og fer í næstum at uppbyggja sítt egna fjarskiftiskervi**

FJARSKIFTI
*Rúnar Reistrup*

Eftir at hava virkað á marknaðinum fyri fastnettelefon og internet í gott eitt ár, setir fjarskiftisfyritøkan Kall nú kósina ímóti fartelefonmarknaðinum.

Við einari avtalu upp á pláss við svensku fyritøkuna Ericsson um veitan av GSM-tænastum í Føroyum, fer Kall nú undir at uppbyggja egið GSM fartelefonkervi. Byrjað verður í Havn, har fyra antennumastrar verða settar upp í næstum. Síðan verða antennur og mastrar settar upp kring alt landið.

Ætlanin er at bjóða fartelefontænastur út í november í ár. Til ta tíð hevur Kall bert egnar antennur í Havn, men fartelefonirnar fara at kunna brúkast alla staðni, har fartelefonir í løtuni røkka.

Hetta er møguligt við tað at Kall ger avtalu við Føroya Tele um brúk av GSM-kervinum hjá Føroya Tele.

### Kall og Føroya Tele togast

Uttanlands er vanligt at samrøðugjaldið dyrkar í tí løtu fartelefonfelagin brúkar kervið hjá øðrum veitarum, men Bjarni Askam, stjóri á Kalli, dugir enn ikki at siga um hetta verður so í teirra fartelefontænastum. Tað veldst millum annað um hvønn prís Kall skal gjalda fyri at fáa atgongd til GSM-kervið hjá Føroya Tele.

Føroya Tele og Kall samráðast í løtuni um prísin, men tað gongur strilti at fáa semju í lag. Í fyrstu atløgu er Fjarskiftiseftirlitið biðið um at royna at fáa semju í lag millum partarnar, men ber hetta ikki til, fer Kall at heita á Fjarsiftiseftirlitið um at taka eina avgerð. Hetta er heimilað í Fjarskiftislógini, um partarnir ikki kunnu finna fram til semju.

Tá Kall og Føroya Tele í fjør skuldu samráða seg fram til eitt gjald fyri brúk av fastnetkervinum hjá Føroya Tele, gekk strilti at koma fram til semju, og tá var endin tann, at Fjarskitiftiseftirlitið varð biðið um at taka eina avgerð. Tann avgerðin fall í betri jørð hjá Kalli enn hjá hinum partinum.

### Ein fimting av marknaðinum

Kall kom á marknaðin fyri fastnettelefoni og internet 9. apríl í fjør. Fyrsta árið hevur gingið sum ætlað og enntá eitt sindur betur sambært telefyritøkuni sjálvari.

Í dag sigur Kall seg hava umleið 3.000 viðskiftafólk. Hetta svarar til 18 prosent av samlaða marknaðinum fyri fastnettænastur til privatkundar sæð út frá kundatali.

Úrslitið fyri árið 2001 hjá Kalli var eitt undirskot á slakar tíggju milliónir. Men nú byrjunarkostnaðurin er goldin og ein fimtingur av viðskiftafólkunum á marknaðinum er komin í hús, kundi ein hugsa sær, at fyritøkan royndi at konsolidera seg, áðrenn hon fór út í enn eina stóra íløgu í at uppbyggja egið GSM-kervi. Hendan íløgan krevur millum annað at Kall fær eina kapitalhækking í næstum. Soleiðis verður tó ikki, nú Kall ætlar sær at bjóða fartelefontænastur longu í ár.

### Rætt at byrja nú

Á Fjarskiftiseftirlitinum eru tey tó ikki iva um at nyggja fjarskiftisfyritøkan ger rætt á at fara inn á marknaðin fyri fartelefoni so skjótt sum gjørligt.

- Eftir gott eitt ár við øktari kapping á marknaðinum fyri fastnettelefoni og internet er greitt, at karmarnir á teimum økjunum eru um at verða troyttir. Tað verður í framtíðini neyðugt at kunna bjóða viðskiftafólkunum fleiri tænastur, og tí er tað neyðugt hjá Kalli at fara inn á marknaðin fyri fartelefoni, um fyritøkan framhaldandi skal vera við í kappingini á hinum fjarskiftisøkinum, metir sjtórin á Fjarskiftiseftirlitinum, Jógvan Thomsen.

Hesum er Bjarni Askam, stjóri á Kalli, samdur í.

- Tað hevði verið ein stokkut gleði, um vit nú løgdu okkum afturá og steðgaðu íløgunum. So høvdu vit spakuliga máðað grundarlagið undan okkum sjálvum, tí í framtíðini fer brúkið av fastnettelefon uttan iva at minka, meðan allur vøksturin verður innan brúk av fartelefonum, sigur stjórin á Kalli.

### Væntað tað fyrr

Á Fjarskiftiseftirlitinum høvdu tey væntað, at kappingin á fartelefonmarknaðinum fór at koma nakað fyrr, eftir at loyvi at reka GSM net varð givið Kalli millum jól og nyggjár í 2000. Men samstundis skilja teir støðuna hjá fjarskiftisfyritøkuni, sum seinasta árið hevur verið ígjøgum eina samanlegging við TeleF.

Kall ætlaði upprunaliga at bjóða út fartelefontænastur seint á summari í fjør. Men samanrenningin millum Kall og ta minnu fjarskiftisfyritøkuna TeleF hevur sambært stjóranum verið fremst á dagsskránni hjá fyritøkuni fram til í januar í fjør, tá alt var avgreitt, og hetta hevur seinkað ætlanunum á far telefonøkinum eitt ár.

### Mótspælið er í gongd

Í løtuni er Føroya Tele einsamøll fyritøka á marknaðinum fyri fartelefoni í Føroyum. At kapping í næstum verður á marknaðinum fer uttan iva at ávirka gongdina komandi tíðina.

Bjarni Askam vísir á, at á Føroya Tele hava tey verið rættiliga kvik at koma við mótspæli, tá Kall er komin við nyggjum tænastum, og tað væntar hann fer at halda fram.

- Tá vit komu á marknaðin fyri fastnettelefoni og lækkaðu prísirnar, lækkaði Føroya Tele eisini prísirnar. Tá vit bjóðaðu ókeypis internet, tók Føroya Tele stovningargjaldið fyri internet burtur, og soleiðis fer gongdin eisini at halda fram, tá vit koma inn á fartelefonmarknaðin, metir Bjarni Askam.

Hann viðurkennir, at tað hevði verið lættari at fingið viðskiftafólk fyri einum ári síðan, tá færri fólk høvdu fingið sær fartelefonhald hjá Føroya Tele, men vísir á, at bert umleið helvtin av viðskiftafólkunum hjá Føroya Tele er haldbundin.

- Hin helvtin hevur talutíðarkort, og tey kunnu skifta til Kall í morgin uttan trupulleikar, sigur Bjarni Askam, sum tó metir at Føroya Tele longu er í gongd við at tryggja sær fleiri haldbundin viðskiftafólk við tilboðnum um "GSM-frítíð", ið er eitt bíligari hald við øðrum treytum enn vanliga haldið.

- Tað sær út til at mótspælið longu er í gongd, sigur Bjarni Askam, stjóri á Kalli, sum í næstum fer undir at bjóða telefonglaðum føroyingum fartelefontænastur.


GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

**Nissan Micra 1,0** grønur, 3 hurðar, árg. 2000, 27.000 km. **88.000**

**Nissan Almera 2,0 Diesel GX** grønur, 5 hurðar, árg. 1997, 110.000 km. **110.000**

**Nissan Almera 2,0 Diesel GX** reyður, 4 hurðar, árg. 1998, 119.000 km. **110.000**

**Nissan Primera 1,6** svartur, 4 hurðar, árg. 1998, 55.000 km. **110.000**

Sosialurin

**Nissan Primera 2,0 SLX** hvítur, 4 hurðar, árg. 1997, 45.000 km. **105.000**

**Nissan King Cab 4x4 DieselTurbo** blágráur, 2 hurðar, árg. 1998, 55.000 km. **130.000**

**Peugeot 306 Hdi 2,0 St.car** svartur, 5 hurðar, árg. 1998, 60.000 km. **120.000**

**Peugeot 306 DT 1,9** bláur, 4 hurðar, árg. 1997, 150.000 km. **90.000**

**Peugeot 605 SRDT 2,1 Aut.** bláur, 4 hurðar, árg. 1994, 230.000 km. **120.000**

**Opel Corsa 1,4** reyður, 5 hurðar, árg. 1996, 105.000 km. **68.000**

**Opel Corsa 1,2S** reyður, 5 hurðar, árg. 1990, 120.000 km. **10.000**

**Opel Corsa 1,6** bláur, 5 hurðar, árg. 1995, 109.000 km. **67.000**

**Opel Astra 1,6** svartur, 5 hurðar, árg. 1998, 55.000 km. **105.000**

**Opel Vectra 1,4** hvítur, 4 hurðar, árg. 1990, 255.000 km. **26.000**

**Opel Vectra 2,0 Di** bláur, 4 hurðar, árg. 1998, 96.000 km. **130.000**

**Subaru 1600** hvítur, 4 hurðar, árg. 1989, 104.000 km. **10.000**

**Saab 900** reyður, 3 hurðar, **12.000**

**Saab 900 S** reyður, 5 hurðar, árg. 1996, 119.000 km. **98.000**

**Ford Escort 1,6** gráur, 3 hurðar, árg. 1992, 179.000 km. **18.000**

**Fiat Tipo** grønur, 5 hurðar, árg. 1990, 196.000 km. **10.000**

**Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir**
Bilarnir finnast eisini á:
**www.nissan.fo**

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61